# list við íblástri



*Zacharias Heinesen: Kúvingafjall, 2002*

íblástur til kubismuna, ið er ein endalig uppgerð við mimetiska kravið til listina. Við kubismuni verður staðfest, at eingin grund er til, at myndlistin skal yvirhalda nátúrlógir sum t.d., at vit menniskju bert kunnu hava eitt sjónarhorn í senn. Í hansara víðgongdu mynd "Frúnnar úr Avignon" frá 1907 síggja vit sostatt kvinnurnar frá síðuni og frammanífrá í senn; fleirstøðan sæst í og við, at nøsin sæst frá síðuni, meðan eyguni eru sædd frammanífrá. Lítil ivi mann vera í, at føroyska myndlisin eisini er merkt av kubismuni, men onkursvegna tykjast Cézanne og hansara eftirmenn (t.d. Matisse) hava havt enn størri týdning, kanska tí at teir tóktust hóligari og ikki eins víðgongdir og Picasso. Ella var kubisman møguliga ov hugsað og ov greinandi til heimligu myndlistina.

## Franskur íblástur

Konstruktiva árinið frá Cézanne er enn sjónligt í føroysku samtíðarlistini. Cézanne hevur sanniliga eisini havt góðar sendiharrar bæði í Føroyum og í danska listaumhvørvinum, ið hevði alstóra ávirkan á føroysku myndlistina. - Siðurin hjá føroyskum listafólkum at fara á danska kunstakademiið at læra, hevur sum kunnugt rátt heilt fram til tað yngra ættarliðið. Cézanne var fyrimynd hjá fleiri donskum listafólkum, t.d. Edward Weie (1879-1943) og svianum Karl Isakson (1878-1922), ið aftur vóru fyrimyndir hjá føroyskum listafólkum sum t.d. Ingálvi av Reyni. Eins og lærarin hjá Zacharias Heinesen á kunstakademinum, Niels Leergaard, valdu teir sær Bornholm sum myndamiðdepil og vórðu tí nevndir "Bornholmaraskúlin". Vit høvdu eisini ein framúr góðan Cézanne-formidlara her heima. Tað var danski listamaðurin Jack Kampmann (1914-1989), sum í mong ár búði og virkaði í Føroyum. Í summum av hansara landslagsmyndum síggja vit júst sama málingaháátt, ið Cézanne fann fram til. Ruth Smith (1913-1958) stígur framúr í føroysku listasøguni við sínum sterku sjálvmyndum, men eisini við vøkrum landslags- og bygdamyndum. Hon var ómetaliga sjálvatfinningarsom og oyðilegði myndir, sum hon ivaðist í vóru nóg góðar. Hesum viðvíkjandi minnir hon ikki sørt um Cézanne. Hugfarsliga myndin "Skálabeiti" ber brá um hennara stóra áhuga fyri impressionistunum og serliga fyri Cézanne. Dentur er lagdur á ljósárinið við løttum, skitsukendum pensilsstrokum, sum á impressionistiskan hátt káma myndevnið, men her hevur listakvinnan eins og Cézanne valt at leggja dent á geometriskar formar, trý- og fýrkantar, ið savna kompositiónina til eina harmoniska heild. Hóast vit varnast dýpdina á gøtuni inneftir, tykjast fleiri partar av myndini rættiliga flatir, t.d. bøurin og bygningurin á høgru síðu, ið tykjast koppa fram móti myndaflatanum og sum hervið bjóða illusionismuni av.

## ZH06

Framsýningin hjá Zachariasi Heinesen verður fyrsta serframsýning, sum verður hildin í hølunum á Tórshavnar Skipasmiðju, har Heystframsýningin stóð sína fyrstu væleydnaðu roynd í fjør. Tað eru sløk hálvthundrað ár síðani Zacharias byrjaði á Myndlistaskúla Íslands í Reykjavík. Síðani í árunum 1959 til 1963 lærdi hann á kunstakademinum í Keypmannahavn. Eins og Cézanne sum fráleið hevði nøkur fá myndevni, ið hann dyrkaði, hevur Zacharias dyrkað sítt myndevnið í so stóran mun og við so góðum úrslitum, at vit kunnu siga, at hansara máliháttur hevur skapað skúla í Føroyum. Bygdin við havið er eitt so dúliga brúkt myndevnið, at tað í støðum tykist slitið sum ein klisjé. Allíkavæl hava tær góðu myndirnar hjá Zachariasi frískligan og spildurnýggjan dám, har landslagsmyndevnið verður nýtt sum málihøvi til at leggja litir á eina flatu eftir einari ávísari listarligari hugsan og skipan. Og hóast myndevnið er tað sama, sæst ein spakulig broyting í málihættinum yvir í móti eini meira blaktrandi, ófriðarligari yvirflatu. Myndirnar hjá Zachariasi eru bjartar og tíðum eru grundlitirnir umboðaðir; gulir og reyðir litblettir festa í bláar og grønligar flatur, sum eru uppbygdar av fleiri litløgum soleiðis, at allur myndaflatin er líkur einum skyggjandi, samansettum teppi. Hóast myndirnar hjá Zachariasi sjálvandi eru nakað væl meira abstraktar enn tær hjá Cézanne, tykjast somu krøv verða sett til bygnaðarligan greidleika, har formarnir skulu samsvara hvørjum øðrum. Tey uttastu, pastosu málingaløgini, ið eru strokin ella spartlað á løriftið, geva myndayvirflatuni ein ruflutan dám, sum fangar ljósið í framsýningarrúminum. Hetta uttara ljósið spælir saman við tí glitrandi ljósinum, sum liggur aftan fyri og skínur út ymsastaðni í myndini gjøgnum tey mongu løgini av máling. Ljóskeldan er ikki naturalistisk og her er ein av teimum stóru mununum millum Zacharias og impressionistarnar. Kanska kann mann siga, at summar av hansara myndum framleiða eitt egið ljós í staðin fyri sum impressionistarnir at skráseta ljósið í náttúruni. Vit fáa at síggja, tá framsýningin hjá Zachariasi Heinesen letur upp á Tórshavnar Skipasmiðju leygardagin 27 mai. Eisini verður eyðvitað gjørt nógv burtur úr franska flogvitinum hetta árið. Fyri listaáhugað kundi eitt aktuelt summarfrítíðarhugskot verið at vitja vakra suðurfranska landslutin Provence. Sí www. cezanne-2006.com



*Hjá Karl Isakson sæst eisini íblástur frá Cézanne*



*Ein av kyrrlutamyndunum hjá Cézanne*